## Beckham sjúkur av EM

Enski landsliðsspælarin David Beckham er so keddur um, at hansara land ikki er við í EM-endaspælinum, at hann klárar valla at hyggja eftir dystunum í kappingini. - Tað hevur verið trupult yvirhøvur at hyggja eftir einum dysti. Eg kenni meg næstan kropsliga sjúkan av at síggja dystirnar. Hetta var ein kapping, sum vit skuldu havt verið við í, sigur David Beckham sambært Skysports.



## Todi hevur kós ímóti uppflyting

Tað tykist vera góðar vánir fyri, at Fremad Amager og Todi Jónsson og allir hinir føroyingarnir í felagnum fara at flyta úr 2. og upp í 1. deild. Í gjárkvøldið spældi Fremad Amager fyrra dystin um eitt pláss í næstbestu deildini. Uppgerðin var í Århus ímóti Brabrand. Fremad Amager vann 1-0. Einsamalla málið varð skorað longu í 8. minutti. Málskjútti var Jacob Josephsen.

Víkingur-ÍF 2-0 (0-0):

# Zoltan vrakaður og so dagsins maður

**Fuglfirðingar mugu ásanna, at nú eru tað aftur teir hinumegin Eiðið, sum eru omaná í lokalbrakunum**

VÍKINGUR-ÍF
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*Víkingur*

*ÍF*



*Fyrr í ár vann ÍF í Gøtu, men hesaferð noyddust teir at lúta fyri samanlagda liðnum hjá gøtumonnum og leirvíkingum*

Tá ið ÍF fyri meiri enn tveimum mánaðum síðani vitjaði í Sarpugerði, var lagið gott á teimum reyðu og hvítu. ÍF vann 1-0, og fyrsti sigurin í Gøtu í 27 ár var staðfesting av, at tað gekk sum eftir ánni hjá fuglfirðingum.

Teir uttan fyri Varmakelduеið hava í mong ár verið fremri í fótbólti enn fuglfirðingar. Tí var ÍF sigurin fyrr í ár serliga søtur, og sviðin hjá gøtumonnum og leirvíkingum kendist serliga meinur.

2-0 sigurin hjá Víkingi í gjárkvøldið boðar frá, at nú er styrkisjavnvágin komin upp á pláss aftur, um tað ber til at siga tað soleiðis, tá ið gongdin nógvu tey seinastu árini verður havd í huga.

ÍF var væl við fyrstu løtuna, tá ið heimaliðið var fjáltursstungið, og sentrali miðvallarin Sølvi Vatnhamar noyddist av vøllinum, tí hann var skaddur í hondini.

ÍF hevði møguleikar, men fuglfirðingar kendu ikki sína vitjunartíð, og sum 1. hálvleikur leið, var tað eyðsýnt, at fundamentið er betri uttanfyri Eiðið, enn tað er innanfyri Varmakeldueið.

Tað kundi tykst sum stórur smeitur, tá ið álitisfulli miðvallarin Sølvi Vatnhamar fór av vøllinum, men tað vísti seg síðani, at Zoltán Bukszegi, sum varð keyptur at standa fyri málunum, men sum hesar seinastu ferðirnar ikki hevur verið fastur maður, hesa ferð gjørdist dagsins maður.

### Munurin kom til sjóndar

Sum 1. hálvleikur leið, gjørdist styrkismunurin støðugt størri. Tað eydnaðist kortini ikki Víkingi at skjóta mál, og tað átti ÍF málverjin, Andras Gango, størsta heiðurin fyri. Hann var framúr og vardi fleiri ferðir meistarliga væl fyri. 17 ára gamli Bárður Hansen hevði hesa ferð fingið møguleikan ímillum teir fyrstu ellivu, og miðskeiðis í 1. hálvleiki hevði hann góða roynd, sum Andras Gango hálvbjargaði. Andreas Lava Olsen var fyrstur á returbóltinum, men hann rakti í tvørtræið.

Eftir innlegg úr høgru frá Andreasi Lava Olsen hevði Zoltan fína roynd, tá ið stórur hálvur tími var farin. Men Andras Gango bjargaði meistarliga, og tíðliga í 2. hálvleiki hevði hann framúr bjarging, tá ið Magnus Skoralíð eftir stórt ÍF verjukiks hevði kúfóður fyri seg sjálvan.

Tá ið ungverski Zoltan varð keyptur til Víking, ætlaðu teir, at hann skuldi vera maðurin, sum syrgdi fyri málunum. Tølini siga, at tað ikki hevur hilnast nakað serligt. Í tíggju teimum fyrstu umførunum hevði hann bara skorað eitt mál, og royndirnar við honum sum fremsta manni og hangandi álopsspælara høvdu ikki sannført Anton Skoradal um, at Zoltán skuldi hava fast pláss á liðnum.

Hesa ferð var hann á beinkinum, men í 2. hálvleiki gjørdist hann dagsins Víkingur, og tað er neyvan nakað at ivast í, at hann fer at fáa boð aftur, tá ið Víkingur sunnudagin fer at spæla á Svangaskarði.

Eftir uppspæl í vinstru, innlegg og temjing setti hann, tá ið tólv minuttir vóru farnir av 2. hálvleiki hol á, og í yvirtíðini var hann aftur á rætta staðnum í røttu løtuni.

ÍF royndi í 2. hálvleiki við stríðsfúsa Bartali Eliasen í álopinum, men tað kendist sum um, at kraftin, yvirskotið og hugflogið, sum fyrsta partin av árinum eyðkendu ÍF spælið, vóru væl torførari at fáa eyga á hesa ferð. Ikki minst tí teir sum í fyrstu umførunum stóðu fadrar at hugflogsríka samanspælinum ikki vóru so eyðsýndir.

Men ÍF hevur longu fyrr í ár víst, hvørjir møguleikar búgva í spælarunum. Tí er einki annað at gera enn at saðla av nýggjum og at leypa upp aftur á hestin. Mikukvøldið varð staðfest, at í løtuni vendir tað í grannauppgerðunum soleiðis, sum tað – við undantaki av fyrst í hesum kappingarárinum – hevur gjørt í nógv ár.

## ÍF ballið liðugt

Fyrsta partin av kappingini var tað ÍF, sum vísti besta fótbóltsundirhaldið. Eftir 4-0 stórtap í Gundadali ímóti B36 í fyrsta umfari vístu teir fín avrik. Tíverri fyri fuglfirðingar stóð úrtøkan ikki altíð mát við avrikini. ÍF Vann heimadystin ímóti Skála og útidystin ímóti Víkingi 1-0, og í heimadystinum ímóti KÍ (2-2) og í nógv umrødda útidystinum ímóti NSÍ (3-2 til NSÍ) vóru teir óhepnir.

Eftir 3-1 heimasigurin á B71 hevur ÍF spælt fimm dystir, uttan at tað hevur eydnast at fingið stig burturúr, og nú er ÍF triði aftast og tvey stig frá niðurflytingarplássi.

Sunnudagin skal ÍF spæla í Gundadali ímóti B36, har setningurin verður at venda óhepnu gongdini og at megna betri úrslit enn í fyrsta umfari.

## Víkingar hyggja uppeftir

Tað gongur eitt sindur upp og niður hjá Víkingi. Næstsíðst løgdu teir rygg til 3-0 tap í Gundadali ímóti B36, umfarið frammanundan vunnu teir 5-0 á Sandi, og frammanundan tí ferðini endaði tað 3-3, tá ið KÍ vitjaði.

Hesa ferð vunnu teir sannførandi á ÍF. Talan var um fyrsta heimasigurin síðani flaggdagin, tá ið Víkingur í Sarpugerði vann 1-0 á NSÍ.

Undan lokaluppgerðini millum NSÍ og B68 í kvøld er Víkingur á fjórða plássi saman við NSÍ, og liðformaðurin, Niclas Niclasen, vil ikki hoyra taling um vandan fyri at flyta niður:

- Vit eru fýra stig frá bronsuni, so tað er tann vegin vit hava fokus, staðfesti miðverjin eftir kærkomna sigurin á ÍF.